# Arbeiðsloysið bara veksur

**Seinastu dagarnar hevur tað nærum verið gerandiskostur í føroysku fjølmiðlunum, at vit hoyra um uppsagnir og fyritøkur, ið lata aftur. Hagtøl hjá ALS vísa eisini, at arbeiðsloysið í landinum bara vaksur, og at í summum økjum stendur heilt illa til**

ARBEIÐSLOYSI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Leingi hevur tað verið sagt, at ein kreppa er ávegis í føroyska samfelagnum, og seinastu tíðina hava nógv tekin verið um, at tað gongur skeiva vegin. Illa sperda alivinnan, nógv skerdi rækjuflotin eru millum orsøkirnar, ið verða nevndar, og nú byrjar tað eisini at síggjast á arbeiðsloysistølunum, at tað ikki stendur so væl til í Føroyum, sum tað annars gjørdi fyri bert stuttari tíð síðani.



*Kring alt landið minkar virksemi á fiskavirkjunum. Kryvjulinjurnar standa stillar*

### Stendur illa til í Suðuroy og á Sandoynni

Verður hugt at talinum fyri arbeiðsleysum í øllum landinum, er talið í dag beint niðan fyri, hvat tað var í apríl í 1999. Men hyggja vit nærri at teimum ymisku økjunum, sæst tað týðuligani, at tað stendur serliga illa til í Suðuroy og á Sandoynni. Í báðum hesum oyggjum er neyðugt at fara heilt aftur til á vári í 1997, tá ið kreppan var upp á tað ringasta, fyri at finna arbeiðsloysistøl, ið eru hægri, enn hvat tey eru í dag. Hinvegin sær tað gott út í bæði í Norðoyggjum og í Vágum, har arbeiðsloysistalið liggur á leið tað sama, sum tað var í 2001.

### Nógvir pengar úr ALS-kassanum

Vaksandi arbeiðsloysið sæst eisini aftur á pengastreyminum úr kassanum hjá Arbeiðsloysisskipanini. Í løtuni liggur útgjaldið 14. hvønn dag um góðar 3,1 millión krónur, og tað er tað hægsta miðalútgjaldið síðani í 1998.

Serliga fiskavirkisskipanin hjá ALS hevur eisini eitt vaksandi útgjald. Seinastu trý árini hevur miðaltalið á fólki, ið hevur fingið lønarendurgjald úr serligu fiskavirkisskipanini ligið um tey 200, men tøl hjá ALS vísa, at í marts mánaða í ár var talið rokið upp á okkurt um 600.

Tað er eisini vert at hava í huga, at í alivinnuni minkar starvsfólkatalið so líðandi, tí at fiskurin minkar so hvørt, og tað verður lítið og einki smolt sett út. Í einum tilmæli um alivinnuna, sum Vinnuhúsið lat gera, stendur at lesa, at okkurt um 780 fólk arbeiða beinleiðis í alivinnuni, og at tað harafturat eru nógv arbeiðspláss í hjávinnum, og hesi fara eisini at minka so líðandi. Serliga verður tað innan kryvjingina, at arbeiðsplássini fara at minka nógv, og í tilmælinum stendur, at ikki færri enn 300 fólk arbeiða innan hetta øki.

# Nógv størri áhugi fyri miðnáms-útbúgvingum

**Væl fleiri ungfólk hava søkt um upptøku á einari av miðnámsútbúgvingunum kring landið í ár í mun til undanfarin ár**

ÚTBÚGVINGAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í Mentamálaráðnum, ið samskipar upptøkuna til tær ymisku miðnámsútbúgvingarnar kring landið, hava tey týðuligani merkt ein vaksandi áhuga fyri hesum útbúgvingum.

### Vaksandi kring alt landið

Deildarstjórin á Vinnu- og miðnámsskúladeildini í Mentamálaráðnum, Eyðbjørn Poulsen, sigur, at tað er ein týðulig broyting farin fram í áhuganum fyri miðnámsútbúgvingunum. Seinastu trý árini hava tað verið gott og væl 900 næmingar, sum á hvørjum ári eru farnir undir eina miðnámsútbúgving, men til komandi skúlaár er talið eksploderað upp á 1061 næmingar. Hetta er ein vøkstur í mun til í fjør upp á 130 næmingar, og tað svarar til góð 14 prosent.

Eyðbjørn Poulsen sigur, at sjálvsagt skal tað havast í huga, at tað eru stórir árgangir, ið nú fara úr og 9. og 10. flokki, men so stórir eru árgangirnir ikki, at tað er einasta orsøkin til ein vøkstur upp á 14 prosent í sambandi við upptøku á miðnámsútbúgvinginarnar. Hann heldur, at stóri vøksturin í áhuganum fyri miðnámsútbúgvingunum er ein greið ábending um, at fólk stúra fyri, at ein kreppa er ávegis í samfelagnum.

Vøksturin í næmingatalinum er galdandi fyri so at siga allar miðnámsskúlar kring landið, men serliga á Kambsdali og í Suðuroy er broytingin stór. Millum annað er talið av nýggjum næmingum á málsligu deildini á Suðuroyar Hf-skeiði vaksið úr 14 í farna skúlaári til 26 í komandi skúlaári.

Eisini á Studentaskúlanum í Hoydølum merkja tey vaksandi áhugan, og Mads Winther, rektari, sigur, at tey hava verið noydd til at søkja um loyvi til at fáa ein eyka flokk í mun til í fjør.

# Lærlingatilgongdin minkað munandi

**Nógv bendir á, at døpru fíggjarútlitini í samfelagnum ávirka talið av læruplássum í Føroyum**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hagtøl, sum Yrkisdepilin hevur savnað, vísa heilt greitt, at talið av nýggjum læruplássum í Føroyum er minkað munandi. Afturgongdin í lærlingatilgongdini er galdandi bæði fyri handverksútbúgvingar og innan skrivstovu og handil. Lønarendurgjaldið til læruplássini er, enn sum áður, 75%, hóast ætlanir vóru frammi um, at hetta skuldi skerast niður í 50%.



*Tað gerst alsamt truplari hjá ungum føroyingum at finna sær lærupláss*

### Minkað við meira enn helvtini

Hagtølini hjá Yrkisdepilinum vísa, hvussu stór lærlingatilgongdin hevur verið innan tær ymisku útbúgvingarnar síðani 1998, og fyri í ár eru tølini fram til 31. mai tøk. Millum annað sæst, at samlaða lærlingatilgongdin seinast fýra árini hevur ligíð um 300 um árið, men fyrstu fimm mánaðirnar í ár, hava bert 85 føroyingar fingið lærupláss, har tað helst átti at tátta í tey hálvtannaðhundrað, um støðið seinnu árini skuldi hildið.

Hyggja vit at einstøku vinnugreinunum, er tað sjónligt, at tað eru summar, ið eru serliga hart raktar. Til dømis hevur talið av teimum, ið eru farin undir at læra til maskinsmið, ligið millum 40 og 50 seinastu fimm árini, men higartil í ár eru tað einans átta, ið eru farin undir hesa útbúgving. Fyri tveimum árum síðani fóru 30 føroyingar undir at læra til elektrikara, men fyrstu fimm mánaðirnar í 2004 hava einans seks fingið slíkt læruplás!

### Merkist eisini innan tænastuvinnuna

Tað er ikki bert á handverksøkinum, at lærlingatilgongdin er minkað munandi. Eisini í tænatuvinnuni er tað farið at ganga skeiva vegin. Tvey tey undanfarnu árini hava ávíkavist 30 og 22 fólk fingið lærupláss innan fyrisiting, meðan talið pr. 31 mai í ár er heilt niðri á fýra. Hjá heilsølunum sær tað heldur ikki ov gott út, tí á hesum øki hevur bert ein føroyingur fingið lærupláss í ár í mun til ikki færri enn 22 í fjør!

Hendan markanta afturgongdin í nøgdini av læruplássum kann óivað tulkast sum, at arbeiðsgevarar kring landið hava minni at gera, og at samfelagshjólini ikki mala eins skjótt, sum tey hava gjørt. Nakað av fyrivarni skal tó takast í sambandi við tølini, tí tað vísir seg ofta, at ein stórur partur av nýggju lærlingunum verða tiknir inn, eftir at eitt skúlaár er farið aftur um bak, tað vil siga frá juli mánaða og frameftir.



# Lítli Petur av landinum mánadagin

**Sosiala Deild á Tórshavnar býráð vil ikki bakka í málinum um lítla Petur, og mánadagin verður 5 ára gamli drongurin fluttur av landinum. Formaðurin í MBD/-DAMP-felagnum, Bára Johansen heldur, at lítli Petur verður viðgjørdur sum ein hundahvølpur av Tórshavnar býráð**

LÍTLI PETUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Hetta verður ein so sterk uppliving fyri drongin, at hann møguliga fer í psykosu. Tórshavnar Býráð hevur viðgjørt Petur sum ein hundahvølp, og ikki sum eitt menniskja, sigur Bára Johansen, formaður í MBD/DAMP felagnum.



*Sum støðan er í løtuni verður lítli Petur sendur á danskan viðgerðarstovn mánadagin*

Mánadagin er ætlanin, at nógv umrøddi 5 ára gamli Petur verður sendur av landinum á danskan viðgerðarstovn. Tórshavnar býrað vil ikki bakka í málinum, og tí verður atferðartrupli drongurin av-heintaður mánamorgunin hjá ommuni og abbanum og sendur til Danmarkar.

– Tórshavnar býráð sigur seg vilja tað besta fyri drongin, men tey hava einki gjørt fyri at fyrireika drongin upp á, at hann skal avstað. Sosiala deild sigur seg vera proffesionella, men hetta er undir alt lágmark, sigur formaðurin í MBD/DAMP-felagnum.

### Tiltak

Bára Johansen greiðir frá, at feløgini í Meginfelag teirra brekaðu, fara at stríðast fyri Peturi til tað seinasta. Seinnapartin fríggjadagin var ætlanin at hava ein fund um málið. Í dag, 5. juni, er Grundlógardagur, og Grundlógardagurin verður vanliga rættartrygdin sett í hásætið, og hesum ætla feløgini í MBF at gera sær dælt av.

– Í morgin (leygardagin, blðm), hava vit tosað um at skipa fyri einum tiltaki fyri at varðveita Petur í Føroyum. At tað júst skal fella á Grundlógardagin passar væl, tí málið er eisini um rættartrygdina hjá honum, fortelur Bára Johansen.

# Tú kanst ikki seta orð á kenslurnar

**Omma Petur, Gunnvør Poulsen, vónar framvegis, at ommubarnið verður verandi í Føroyum. Petur hevur fingið boðini um, at hann skal til Danmarkar at búgva, og hetta hevur ávirkað sinnalagið á fimm ára gamla atferðatrupla dronginum**

LÍTLI PETUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Síðan í februar mánaði í 2003 hevur atferðartrupli Petur búð hjá ommuni og abbanum, Gunnvør og Johannes Poulsen í Purkugerði í Havn. Mánadagin verður Petur avheintaður hjá ommuni og abbanum, og síðan fluttur til Danmarkar.

– Tey fólk, ið varða av málinum um Petur, hugsa bert um løgfrøði og ikki um tað menniskjaliga, men eg vóni framvegis, at vit fáa vent málinum, sigur omma Petur, Gunnvør Poulsen.

Spurd, hvussu tey kenna tað, at ommubarnið eftir øllum at døma verður sent av landinum, svarar Gunnvør, at tað ógjørligt at seta orð á sterku kenslurnar, sum familjan fer ígjøgnum í løtuni.

– Vit hava langt síðan avgjørt, at skuldi Petur sendast av landinum, fóru vit ikki at flúgva hann niður, tí tað høvdu vit snøgt sagt ikki klára. Petur verður óivað hysteriskur, og tað klára vit ikki at síggja, greiðir omman frá.

### Danir vitja

Fyri sløkum 14 døgum síðan vóru umboð fyri danska viðgerðarstovnin og vitjaðu í Føroyum. Uppgávan hjá donsku umboðunum var at hitta familjuna og Peturi á máli.

– Donsku fólkini vóru tveir dagar í Føroyum, og tey nýttu bert 5-10 minuttir at tosa við Petur. Hesi fólkini kundu bert at hava ringt til mín, og spart sær túrin til Føroya, tá tey sýna so lítlan áhuga í dronginum, heldur omman.

### Óróligur

Spurd, um Petur veit, at hann skal av landinum mánadagin, svarar omman, at Sosiala deild á Tórshavnar býráð hevur greitt honum frá, at hann skal til Danmarkar í næstum.

– Petur er nógv óróligari enn hann plagar. Hann var annars blivin meira róligur, men nú er hann aftur blivin hyperaktivur og uppgearaður. Hetta kemst óivað av, at hann veit, at hann í næstum verður fluttur til Danmarkar, sigur omman, Gunnvør Poulsen, at enda.

### Klaga viðgerðina

Gunnvør og Johannes Poulsen hava í vikuni sent eina klagu til Almannastovuna. Omman og abbin heita staðiliga á Almannastovuna um at útseta ætlanirnar um at senda Petur av landinum, tí málið er ikki rætt handfarið. Í løtuni liggur málið hjá Almannastovuni, og omman og abbin bíða nú spent eftir úrskurðinum í málinum.

Vit hava roynt at fingið eina viðmerking frá Sosialu deild á Tórshavnar býráð, men hon hevur als onga viðmerking til málið, áðrenn Almannastovan er komin til eina niðurstøðu.

# Sosiala deild undir sjóneykuna

Sosiala deild á Tórshavnar býrað hevur veruliga verið í andglettinum um viðgerðina av málinum um atferðartrupla Petur. Sosiala deild hevur bæði verið skýrd fyri líkt og ólíkt av fólkum, ið hava tilknýti til málið. Hóast álvarsamar atfinningar, hevur Sosiala deild ikki vilja gjørt stórvegis viðmerkingar til málið um Petur.

Landstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, vil nú kanna nærri, um alt er farið rætt fram í viðgerðini um 5 ára gamla Petur. Hann hevur sett eina kanning í verk um samskiftið millum Tórshavnar kommunu og Karup kommunu, har Petur eftir ætlan skal flyta mánadagin.

– Eg vil gjarna kanna, um Tórshavnar býráð hevur lýst mál nóg væl, og um Karup kommuna hevur fingið alt at vita í málinum, og tí er ein kanning sett í verk, sigur Hans Pauli Strøm.

Landsstýrismaðurin dugir ikki at siga, nær hann fer at fáa frágreiðingina um samskifti millum Tórshavnar býrað og Karup kommunu.

**-páll**

# Styrkja fosturforeldraskipanina

**Landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm, sigur, at tað má ikki koma fyri, at vit verða noydd at senda fólk av landinum, tí einki stovnstilboð er í Føroyum**

ATFERÐAR-TRUPUL BØRN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Síðan málið um 5 ára gamla Petur kom undan kavi í Sjónvarpi Føroya fyri nøkrum mánaðum síðan, er trýstið á landsstýrismannin, Hans Paula Strøm, alsamt økt um at fáa ein haldgóða skipan til smábørn við atferðartrupulleikum.

– Vit hava í dag stovnstilboð til atferðartrupul fólk í øllum aldri, uttan til smábørn. Tað má ikki koma fyri, at vit verða noydd at senda fólk av landinum, tí vit ikki hava nakað stovnstilboð til tey í Føroyum og hetta ætli eg mær avgjørt at gera nakað við, sigur Hans Pauli Strøm.

Landsstýrismaðurin greiðir frá, at málið er fáa eitt haldgott stovnstilboð til atferðartrupul børn, men hetta tekur drúgva fyrireikingartíð.

– Embætisfólkini í ráðinum hava seinastu tíðina kanna, hvørji tilboð kunnu veitast atferðartruplum børnum. Tey eru komin eftir, at vit í fyrstu atløgu eiga vit at bjóða eina styrkta fosturforeldraskipan, áðrenn vit eru klár at bjóða eitt stovnstilboð til atferðartrupul børn, sigur Hans Pauli Strøm.

Landsstýrismaðurin greiðir frá, at fosturforeldraskipanin verður styrkt við fleiri fakfólkum, sum fosturforeldrini at atferðartruplum børnum kunnu dúva upp á.